# Olaus fyribils aðalstjóri

Olaus Jespersen er fyribils settur aðalstjóri í Mentamálaráðnum. Vágaportalurin skrivar, at Olaus Jespersen (myndin) røkir starvið frá 1. september, til nýggjur aðalstjóri verður settur í mentamálaráðnum. Olaus er deildarstjóri fyri fólkaskúladeildina í mentamálaráðnum, og hann hevur starvast í mentamálaráðnum síðani 1986.



# Fosturtøkulógin skal endurskoðast

- Hetta skal gerast í heilsufakligum umhvørvi, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður. Hóast samgongan hevur avtalað at parkera fosturtøkulógina, ætlar landsstýrismaðurin í heilsumálum at endurskoða fosturtøku í Føroyum. Hans Pauli Strøm sigur við útvarpið hjá Kringvarpinum, at í fyrstu syftu verður tað gjørt í einum heilsufakligum umhvørvi. Tað politiska kjakið aftaná ætlar landsstýrismaðurin at taka aftaná, sigur hann. Ein danskur felagsskapur bjóðar føroyskum kvinnum at fremja sínar egnu fosturtøkur. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, heldur tað vera ógvuliga óheppið, men hann ásannar, at tilboðið kemur, tí vit hava eina avoldaða fosturtøkulóg - bæði í teksti og hugsunarhátti. Hann vil greina grundarlagið í heilsuligum høpi, heldur enn at gera tað til eitt politiskt mál - fyri ella ímóti fosturtøku.

# Friðarligt vikuskifti hjá løgregluni

**Frá løgregluni verður sagt, at vikuskiftið hevur verið stak friðarligt. Okkurt smátt hevur verið, men eingi stórmál av nøkrum slag**

LØGREGLURAPPORTIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fríggjadagin regnaði illa, og tá varð løgreglan í Havn fráboðað um at olja rann út á sjógv í Tórshavn, men talan var um so smáar nøgdir, at einki varð gjørt við hetta.

Náttina til leygardagin varð løgreglan boðsend til húsaófrið, og í eysturbýnum varð herverk fram á ein bil, har ein rútur varð sorðaður.

Leygarkvøldið varð ein maður inni á støðini og svav rúsin av sær, umframt at onkur varð mistonktur fyri rúsdrekkakoyring. Viðkomandi varð tó ikki funnin.

Náttina til sunnudag varð boðað frá tónleiki, sum var til ampa, og í vesturbýnum varð ein bilur árendur, og og hin førarin rýmdi av staðnum. Hann varð tó funnin, og kann vænta sær eina heilsan frá fútanum.

Sunnumorgunin kom ein maður inn á støðina at sova.

Sunnukvøldið gjørdi ein springari landgongd á Signabø. Hesin fekst ikki á sjógv aftur, og varð tí skorin á háls í samráð við sýslumannin.

Í morgun varð boðað frá, at onkur hevur ripa ein stein gjøgnum ein rút á einum sethúsum í vesturbýnum.

Av Argjum varð eisini boðað frá, at ein bilur hevði rent á ein garð og ein pela, og varð síðani rýmdur av staðnum. Hetta sóu fólk tá tey komu upp, og tískil veit eingin at siga, hvør viðkomandi er, sum hevur rent á.

## Runavík

Løgreglan í Eysturoynni hevur heldur ikki havt tað heilt stóra at gera um vikuskiftið. Fríggjadagin varð boðað frá, at onkur hevur stolið kavaraútgerð av skipasmiðjuni á Skála, og er talan um útgerð við stórum virði.

Leygaradagin varð eitt minni ferðsluóhapp á Glyvrum, her tveir bilar bóru við hvønn annan. Tað sama kom fyri í Skálafirði, har Fjarðafestivalur var um vikuskiftið.

Fríggjakvøldið varð onkur ónøgdur við »gorillahegnið« framman fyri stóra pallinum á Fjarðafestivalinum, og hetta varð so rættað.

Tvær ferðir hevur løgreglan í Eysturoynni verið kallað út til húsaófrið, og leygarnáttina vóru tveir mans farnir til hendurs í Fuglafirði, har tiltak var í Mentunarhúsinum. Einki meira var tó gjørt við hetta málið, og mennirnir funnu sjálvur útav at semjast.

## Klaksvík

Í Klaksvík hevur eisini verið sera friðarligt um vikuskiftið. Fríggjadagin varð ein leysur hundur tikin upp, og ein maður varð koyrdur til hús. Afturat tí vóru lastvognarnir, sum skuldu á Truckerfestivalin eskorteraðir gjøgnum býin. Harafturat var ein fullur maður til ampa, og varð so tikin.

Einaferð leygardagin vóru nakrir ungir mans steðgaðir í at heinta svampar á Norðoyri.

Leygarkvøldið varð boðað frá royki inni í bygninginum, har Barok og Pizza 67 húsast. Barok varð latið aftur, og roykurin kannaður, Tað vísti seg tó bert at verða ein lítil eldur í einum málara í kjallaranum, og talan varð bert um roykskaða.




Sunnumorgunin varð húsaófriður í Klaksvík, har feðgar vóru farnir til hendurs.

Eitt lítið ferðsluóhapp var eisini, har ein fótgangari varð árendur, og bilførarin rýmdi av staðnum. Hann er tó funnin og kann vænta sær eina heilsan frá fútanum.

Sostatt kann staðfestast, at vikuskiftið hevur verið sera friðarligt, hóast fleiri smærri og onkur størri tiltøk hava verið um vikuskifið.

# Elmar Ósá settur sum barnalækni

TÍÐINDI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í dag byrjaði Elmar Ósá í nýggjum starvi sum barnalækni á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum. Hann útbúgvin í Danmark, og hevur í høvuðsheitum starvast á Ríkissjúkrahúsinum og sjúkrahúsunum í Hvidovre og í Næstved.

Formliga verður hann útbúgvin fyrst í 2009, men hevur nú staðið alt tað, ið krevst til at hann kann kalla seg barnalækna, sum er sergrein innan læknaútbúgvingina.

Fyribils er hann settur í hálvt ára vikariat, men ætlandi verður hann settur í fast starv, og heldur áfram at arbeiða í Føroyum framyvir.

- Vit fara nú at leita eftir grundstykki og ætla at búseta okkum fast í Føroyum, sigur Elmar Ósá, sum frá í dag av er settur sum barnalækni á Landssjúkrahúsinum.

Elmar Ósá er 39 ára gamal, og er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Hann er sonur Jógvan Ósá, løgreglumann, og er giftur Tórunn Højgaard Ósá. Saman eiga tey fýra børn. Elmar Ósá er eisini kendur innan ítrótt, har hann sum fyrsti føroyski ítróttarmaður vann heiðursmekri í svimjing á Oyggjaleikunum. Hann hevur eisini gjørt um seg í hondbólti, og varð partur av Neistaliðnum, sum vann føroyameistaraheitið í 2000.

